

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 12 - 2012

# Norðurnorra komandi arbeiðspláss hjá føroyingum

Komandi árini verða so mikið stórar útbyggingar framdar innan olju- og gassvinnuna í londunum kring okkum, tvs. vestan fyri Hetland, í Norðsjónum og ikki minst í Norðurnoregi, umframt í námsvinnu í Grønlandi, at hetta átti at kunna skaffað arbeiði til nógvar føroyingar. Og tað økið, sum føroyingar helst kunnu fáa mest gagn av og skjótast gerast partur av, heldur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen í hvussu er, eru ovurstóru útbyggingarnar, sum komandi árini fara fram í Norðurnorra sum avleiðing av leitivirkeminum í Barentshavinum. Heimaftur úr Harstad Stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen er júst komin heimaftur frá ráðstevnu í norðurnorska býnum Harstad, har meira enn 200 luttakarar úr Noregi og øðrum londum hava fylgt framløgunum um framtíðar oljumenningina í Norðurnoregi. Petur Joensen, sum kemur heimaftur á klettarnar eftir nakrar gevandi dagar, er rættiliga ovfarin av tí framtíð, sum norðastu landspartarnir standa í boði í kjalarvørrinum á eini spildurnýggjari oljuvinnu har um leiðir. Bæði í Norðsjónum og kanska serstakliga í Barentshavinum bíða stórar útbyggingar av olju- og gassfundum umframt tað vaksandi leitivirksemi, sum fer at taka seg upp har komandi mongu árini. Fyri at veita tænastur til hetta nýggja virksemið er neyðugt við stórum útbyggingum á landi eisini. Og tað vóru m.a. eisini hesar, sum ráðstevnan í Harstad snúði seg um. Umframt mongu arbeiðsplássini offshore. Virksemið fer so sanniliga at booma her norðuri komandi árini. Tað verður megastórt sum fleiri av fyrilestrarhaldarum tóku til. Leitingin og útbyggingarnar fara at seta nógvar ringar í vatnið, og tað ræður um hjá fólkunum har at lofta teimum. Hetta eru tey tó ikki før fyri einsamøll, og tí er lyklaorðið samstarv, eitt nú við størri fyritøkur, fyri at nøkta stóra eftirspurningin komandi árini. Barentshavið Barentshavið serstakliga verður eitt nýtt og stórt kjarnuøki, ein sokallaður hubbur, sum tikið verður til á

oljumáli. Tøkniliga menningin har verður ógvuslig, og tað fer at merkja virksemið. Petur Joensen vísir á, at tað fer at verða ein trupulleiki at útvega nokk av fólki til vaksandi virksemið í Norðurnoregi, og hetta átti at givið føroyingum nakað at hugsa um. Eg haldi føroysk vinna longu nú eigur at gera upp við seg sjálva, um hetta økið er vert at satsa uppá í framtíðini, nú har fer at henda so nógv. Marknaðurin er har, hann verður rættiliga stórur, og hann verður nógv ár fram í tíðina. Men harfyri er ikki sagt, at tað ikki eru avbjóðingar, skuldu føroyskar fyritøkur valt at satsa uppá hetta økið. Her kann vera gott at fáa avtalur við størri fyritøkur um at lata bæði vørur og tænastur og ikki minst fólk. Hann heldur tað sjálvandi er spennandi hjá føroyingum at hyggja móti Grønlandi, nú ísurin bráðnar og har skapast nýggir møguleikar. Hesir fara tó ikki í fyrstani at snúgva seg um olju ella gass, men heldur um námsvinnu. Skulu vit hinvegin til at finna arbeiðsmøguleikar í olju- og frálandavinnuni uttan fyri Føroyar, so er Norðurnorra eitt sera gott boð heldur almenni oljustjórin. Og her kundi ein møguleiki hjá føroyingum kanska verið at bjóða seg fram at manna heilar pallar við fólki. Tað skuldi verið líka til høgrabeinið hjá føroyingum at manna og reka pallar, nú vit eiga útbúgvin og roynd fólk til tær flestu av maritimu uppgávunum á einum boripalli. Og pallum verður tað brúk fyri í ólukkumát, nú oljuvinnan stendur fyri uppblomstran í Barentshavinum. Hammerfest Stór og áhugaverd ráðstevna verður longu aftur í apríl 2013, og tá verður hon enn longri norðari, í Hammerfest. Tá ONS varð hildið í Stavanger í september vitjaði Petur Joensen saman við oljumálaráðharranum, Johan Dahl básin hjá Hammerfest og kommununum í Norðurnoregi. Har vórðu knýtt sambond, sum kunnu vera við til at byggja brýr millum Føroyar og samfeløgini í Norðurnorra. Ì nógvum førum líkjast hesi økini, eitt nú í støðd, fjarstøðu og í aðrar mátar, og tí hava umboð fyri myndugleikar og vinnu í Hammerfest boðið sær at koma til Føroya at tosa um teirra royndir á oljuøkinum. Petur Joensen hevði aftur høvi at hitta mong av hesum fólkum, sum arbeiða innan vinnuna og almennu fyrisitingina, og tey síggja fyri sær eitt framtíðar samstarv millum Føroyar og Norðurnoreg. Og tey vilja fegin hava, at føroyingar kunnu læra av teirra royndum og eisini øvugt. Ein spurningur, sum er nógv frammi í kjakinum, er um tú skal spjaða virksemið ella savna tað á einum stað. Tað eru tey, sum halda, at tað er betur at hava eina stóra og vælútgjørda útgerðarstøð at taka ímóti eftirspurninginum úr Barentshavinum heldur enn at spjaða virksemið. Tilflyting Eitt, sum Petur Joensen eisini legði til merkis á ráðstevnuni, var tað bjartskygni, sum komandi oljuvirksemið hevur við sær, nevniliga at tað fer at bera til at venda fráflytingini frá smærri plássunum. Við nógvum oljuvirksemi, sum krevur útbúgvin fólk av ymsum slag, ber veruliga til at broyta fráflytingina til eina tilflyting aftur til økini har norðuri. Eitt fyribrigdi, sum vit í Føroyum eisini síggja fram til, verður oljan funnin og harvið kann skapa grundarlag undir vinnumenning og virksemi.